Dúgvan:

# Bilplássið minkar við einum fimtingi

**Dúgvan, sum siglir millum Leirvík og Klaksvík, er í løtuni til uppmerkingar. Hesar uppmerkingar fara at føra við sær, at plássið til bilarnar á dekkinum minka 20 % og betri pláss verður til ferðafólkið**



*Dúgvan fær gular strikur í dekkið, so betri pláss verður til ferðafólkið. Hetta hevur tó avleiðingar, tí tað kemur at føra við sær, at bilaplássið á dekkinum kemur at minka við 20 prosentum*

*Savnsmynd*

SAMFERÐSLA
*Ingrid Bjarnastein*

**Klaksvík:** Mánadagin byrjaði Ternan at avloysa Dúgvuna við siglingini um Leirvíksfjørð. Hetta kemst av, at ymiskar uppmerkingar skulu gerast á dekkinum.

– Hetta er eitt arbeiði við Skipaeftirlitinum, sum hevur verið ávegis leingi, sigur Magnus Magnussen, tekniskur leiðari á Strandferðsluni.

– Ein skabilón skal roynast, har vit mála nakrar gular strikur á dekkið, sum fara at geva ferðafólkunum betri pláss at ganga í.

Um ferðafólkið skal hava meira pláss at ganga á merkir tað jú, at meira verður tikið av plássinum til bilarnar.

Magnus Magnussen upplýsir, at plássið til bilarnar umborð á Dúgvuni fer at minka við 20 prosentum, og tað kann sigast vera rættiliga nógv, tá hugsað verður um, at Dúgvan frammanundan ikki megnar at nøkta tann stóra tørvin. Men Magnus metir, at um ein vil raðfesta ferðafólkið, so er hetta nakað, ið má gerast.

Spurdur um, hví ein landgongd ikki verður gjørd sigur Magnus Magnussen:

– Tað vísir seg, at undirtøka er ikki fyri at gera eina landgongd.

Dúgvan fór úr sigling mánadagin, men verður longu aftur í dag, mikudag.

Tær gulu strikurnar á dekkinum eru bara fyribils, men um hetta vísir seg at vera ein góð loysn, verða tær permanentar, verður upplýst av Strandferðsluni.

# Sirkus Arena til Føroya

**Í næsta mánaða fer at bera til hjá føroyingum at fara í sirkus. Kenda, danska sirkus Arena kemur til Føroya at hava tríggjar framførslur**



SIRKUS
*Jón Brian Hvidtfeldt*

Vikuskiftið 7. til 9.februar kemur kenda danska sirkus Arena hendaveg at vísa føroyingum síni kynstur. Framførslur vera bæði í Runavík, í Klaksvík og í Havn.

Við á ferðini eru millum annað klovnar, gyklarir (jonglørar) og akrobatar, sum skulu vísa síni kynstur. Talan er um sirkus, bæði fyri børn og vaksin. Tilsamans eru tey 15 fólk við í ferðalagnum hjá sikus Arena, tá tey koma til Føroya.

## Vetrarsirkus

Í heyst vitjaði sirkus Arena í Grønlandi fyri 19.ferð, og í hesum døgum ferðast tey kring Jútland við einum sonevndum vetrarsirkusi, ið kann framførast í stórum ítróttarhøllum. Og tá rundferðin í Jútlandi er liðug, gongur leiðin til Føroya.

Um sumrarnar ferðast sirkusið kring Danmark við einum stórum sirkustelti, sum framførslurnar verða hildnar í. Og tá eru m.a. eisini fleiri djór við í sýningunum. Men um vetrarnar minka tey framførslurnar, so tær kunnu haldast í ítróttarhøllum, og tá eru vanliga eingi ella bara heilt fá djór við. Og eingi djór vera við á Føroyaferðini hjá sirkus Arena.

## Sirkus í hálva øld

Sirkus Arena er eitt gamalt sirkus, stovnað í 1955. Tað var pápi Benny Berdino, sum í dag er kendur sum tann syngjandi sirkusstjórin í Arena, ið legði lunnar undir hetta sirkusið. Benny Berdino verður eisini við í Føroyum, har hann fer at standa fyri framførslunum.

Í dag rópa tey í sirkus Arena seg sjálvi fyri størsta sirkusið í Norðurlondum, og um sumrarnar eru 217 fólk knýtt at sirkusinum.

Sirkusstjórin hevur øll árini lagt seg eftir at hava sirkus, eisini á fjarskotnum leiðum í kongaríkinum, og sum longu nevnt hava tey verið ikki færri enn 19 ferðir í Grønlandi, umframt at tey hava havt fleiri framførslur í Íslandi.

Sirkus Arena vitjaði í Føroyum fyri 10 árum síðani, men síðan tá hevur sirkusið ikki verið aftur her. Men nú hildu tey so, at tíðin var komin at vitja Føroyar.

## Góðar vónir

Tey í sirkus Arena hava góðar vónir um at føroyingar fara at taka væl ímóti sirkusinum, nú tey koma til Føroya. Fyrsta framførslan verður í høllini í Runavík fríggjadagin 7. februar klokkan 19, onnur framførslan verður í høllini í Klaksvík leygardagin 8. februar klokkan 17, og seinasta framførsla verður í Havn sunnudagin 9.februar klokkan 16. Tað kostar 110 krónur at síggja tey í sirkus Arena vísa síni kynstur.



# Fingu tvær ferðir uppí bátin av sild

**- Vit fingu heili 30 tons av sild mánadagin, sigur Joen-Jacob Johannesen, sum eigur bátin, Katrin, ið roynir við nót eftir sild á Skálafjørðinum**



*Joen-Jacob, sonur og abbasonur hava rættiliga rokast á sildaveiði seinasta mánaðin. Mánadagin fingu teir tvær ferðir uppí bátin inni á Skálafjørðinum*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

SILDAROK
*Vilmund Jacobsen*

Vikan, áðrenn Havsbrún í Fuglafirði gavst at taka ímóti fiski fyri jól, gjørdist tann størsta hjá nordafarbátinum, Katrin úr Søldarfirði, nakrantíð.

Sosialurin var á bryggjuni á Toftum næst seinasta dagin, teir royndu eftir sild fyri jól. Hetta var ein hósdag og teir fýra dagarnar frammanundan, hevði Katrin fingið heili 80 tons av sild. Ætlanin var at fara avstað aftur fríggjadagin, sum var tann fimti royndardagurin. Fingu teir 20 tons hendan fríggjadagin, høvdu teir heili 100 tons av sild á Skálafjørðinum í eina viku!

Og tað eydnaðist.

Fríggjadagurin royndist eins væl og hinir dagarnir í vikuni. Sostatt gjørdist hendan vikan fyri jól tann besta nakrantíð.

- Vit fingu nevniliga meira enn 100 tons av sild tilsamans hesa vikuna, sigur Joen-Jacob Johannesen, sum eigur bátin.



*Nordafarbáturin, Katrin, er søkklaðin næstan hvønn einasta royndardag. Við stýriborðssíðu hongur nótin við fleiri tonsum av sild*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

## 30 tons mánadagin

Havsbrún gavst at taka ímóti fiski, 19. desember og byrjaði aftur at taka ímóti mánadagin í hesi vikuni.

Sildin, sum Katrin fiskar, verður øll landað til ídnað. Tá er ikki neyðugt, at hon er púra fesk. Tí var Joen-Jacob aftur úti við nótini bæði fríggjadagin og leygardagin í síðstu viku.

- Vit fingu uppí bátin hesar báðar dagarnar, eini 15-16 tons hvønn dagin.

Mánadagin í hesi vikuni vóru teir aftur úti, og tá gekk so avbera væl.

- Vit fingu tvær ferðir uppí bátin hendan dagin, eini 30 tons tilsamans. Vit kastaðu fyrru ferð í lýsingini og seinnu ferð nakað eftir døgurða, sigur hann.

Týsmorgunin um 10-tíðina, tá ið Sosialurin frætti frá Joen-Jacob, vóru teir aftur við nótini. Men hendan morgunin gekst ikki so væl í hond.

- Vit høvdu nógva sild í nótini, men fingu fast í botn. Tá ið leyst var, var meginparturin sloppin útaftur. Vit eru nú á veg inn við einum sjatti av sild, eini 5 tonsum, sum eftir vóru, tá ið avtornaði.

Ætlanin var at gera ein túr aftrat seinnapartin týsdagin.

## Nógv sild

Joen-Jacob sigur, at nógv sild hevur staðið har úti á Skálafjørðinum í seinastuni.

- Vit hava roynt á leiðini millum Toftabygd og Strendur, og nú so nógv sild er at fáa, verður roynt at fáa sum mest burtur úr henni, meðan fiskiskapurin enn er góður, leggur hann aftrat.

Prísurin er hesi sildini, sum næstan kemur livandi til lands, má sigast at vera vánaligur; hann er nevniliga ein króna fyri kg.

- Einar 5-6 sildir fara til hvørt kilo, sigur Joen-Jacob Johannesen at enda.

Teir gomlu plaga at siga, at tá ið sildaprísurin var bestur undir seinna kríggi, kostaði ein sild eina krónu. So høgt var hon í metum tá…

# Ráðstevna í Mentanarhúsinum í Fuglafirði

**Týsdagin 14. januar verður ein ráðstevna um sporføri innan fiskivinnuna í Mentanarhúsinum í Fuglafirði. Vinnuhúsið sigur, at ein av fyrilestrarhaldarunum kemur frá stóru Trace Fish-verkætlanini, sum endaði í november í fjør**



*Ráðstevna um sporføri í fiskivinnuni verður í Mentanarhúsinum í Fuglafirði, 14. januar.*

RÁÐSTEVNA
*Vilmund Jacobsen*

Í altjóða handli og í samskifti innan fiskivinnuna verða sett støðugt størri krøv og ynskir til sporføri frá veiðu til lidnu vøruna, vísir Vinnuhúsið á í tíðindabrævi.

- Endamálið við ráðstevnuni, sum verður í Mentanarhúsinum, er at fáa sporføri á dagskránna í føroyska kjakinum, og soleiðis verða við til at seta eina menning í gongd á hesum øki, verður sagt.

Ráðstevnan, 14. januar, verður sett av Jørgeni Niclasen, landsstýrimanni í fiskivinnumálum.

Evnini, sum verða viðgjørd, eru hesi: Trace Fish standardurin fyri alifisk (Jostein Storøy frá SINTEF í Noregi, sum var formaður í arbeiðsbólkinum fyri alifiski, greiðir frá hesum standardi), Elektroniskar logbøkur og aðrir hentleikar umborð á skipum (Kristján Gislason frá RADIOMIÐUN greiðir frá um elektroniskar hentleikar í veiðiliðnum), Sporføri í føroyskari fiskivinnu (Poul Johannes Østerø frá COM-DATA greiðir frá dataflow í føroysku fiskivinnuni - hvør framleiðir data, hvør sendir til hvønn, og nær og hví missa vit sporførið), Tann føroyska sporførisvisiónin (Jørleif Bech frá COM-DATA greiðir frá, hvat ein total sporførisskipan kann upplýsa. Her verður víst, hvussu ein vanligur keypari í París kann fáa atgongd til allar møguligar upplýsingar, ið snúgva seg um júst ta føroysku fiskavøruna).

Vinnuhúsið sigur, at ráðstevnan er fyri innboðin, og væntandi luttaka umboð fyri ein stóran part av fyritøkunum, ið starvast innan føroysku fiskivinnuna, bæði beinleiðis og óbeinleiðis. Eisini verða umboð fyri almennar fyritøkur og stovnar, ið hava við fiskivinnuna at gera, við á ráðstevnuni.

Tað er Fiskivinnuroyndir, sum stuðla ráðstevnuni, og Virkisráðgevingin tekur sær av umsitingarliga partinum.